# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17.10.2022 |
| Mál nr.: | 22/14742 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin)**
(Keyp av egnum partabrøvum, dagføringar av stovnsheitum, herdar revsireglur og málsligar nágreiningar o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin) við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í §§ 1, stk. 1, 2 og 5, 2, 11, stk. 2, 12, stk. 3, 15, stk. 1, 18, stk. 5, 20, stk. 1, 21, stk. 2, 22, stk. 1, 26, stk. 1 og 2, 27 og 28, stk. 1, 4 og 5 verður "lóg" broytt til: "løgtingslóg".

**2.** Í §§ 1, stk. 4, 5, stk. 2 og 14a, stk. 1 verður "Toll- og Skattaráð Føroya" broytt til: "TAKS".

**3.** Kapittul 1 b verður strikaður.

**4.** Í § 5, stk. 3 verður eftir 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Stk. 1 er heldur ikki galdandi, tá eitt børsskrásett felag keypir egin partabrøv á einum skipaðum marknaði, tá endamálið við afturkeypinum antin er at lækka partapeningin ella at nýta partabrøvini sum lið í lønargjaldi til starvsfólk."

**5.** Í § 12 verður eftir stk. 3 sum nýtt sett:
"*Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi, um hjúnafelagi, arvingar ella legatarar ikki eru fult skattskyldug í Føroyum, ella sambært ásetingunum í einum tvískattasáttmála ikki eru heimahoyrandi í Føroyum. Tá vinningur ella tap verður gjørt upp í sambandi við útlutan av teimum í § 1 nevndu ognum úr einum deyðsbúgvi til hjúnafelaga, arving og legatar, ið ikki

er fult skattskyldugur í Føroyum, ella sambært ásetingunum í einum tvískattasáttmála, ikki er heimahoyrandi í Føroyum, verður ásannaður vinningur ella ásannað tap roknað upp í skattskyldugu inntøkuna hjá búnum."

**6.** Í §§ 15, stk. 3, 16, stk. 2, 18, stk. 1 og 3, 20, stk. 1, 28, stk. 2 og 4 verður "Toll- og Skattstovu Føroya" broytt til: "TAKS".

**7.** § 18, stk. 1, 1-3 pkt. verða orðað soleiðis:
"Tað áliggur skattskylduga at geva upp skattskyldugu upphæddina sambært § 14 um talgilda loysn ella á oyðublaði, sum TAKS letur gera. Upplýsingarnar skulu latast TAKS samstundis, sum sjálvuppgávan eigur at verða latin inn sambært skattalógini. Persónar, feløg, grunnar o.o., sum hava fingið kapitalvinningsuppgerð, skulu tó ikki lata inn oyðublað, um upplýsingarnar á kapitalvinningsuppgerðini eru rættar og fullfíggjaðar."

**8.** Í §§ 18, stk. 1, 21, stk. 2, 22, stk. 2, 25, stk. 1, og 28, stk. 2 verður "Toll- og Skattstova Føroya" broytt til: "TAKS".

**9.** § 18, stk. 1, 5. pkt. verður strikað.

**10.** § 21, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Øll, ið eru fevnd av hesi løgtingslóg, hava, tá hetta verður kravt, skyldu at leggja fyri TAKS allar upplýsingar, sum kunnu verða viðkomandi fyri TAKS í eftirlitshøpi. Ásetingin fevnir eisini um triðjamann, sum hevur í hendi upplýsingar hjá einum, sum er fevndur av hesi løgtingslóg.

**11.** § 23, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tann, sum við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda skatt av inntøku, ið er skattskyldug eftir hesi løgtingslóg, greiðir rangt frá ella á annan hátt gevur villleiðandi upplýsingar ella letur vera við at lata inn upplýsingar sambært § 18, stk. 1, verður revsaður við sekt ella fongsli upp í 2 ár."

**12.** Í § 24, stk. 1 verður sum nýtt nummar sett:
"3) brýtur upplýsingarskylduna í § 21, stk. 1 ella forðar TAKS í at nýta heimildina í § 21, stk. 2 at koma á staðið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verður mælt til at gera nakrar evnisligar umframt nakrar formligar broytingar í kapitalvinningsskattalógini.

Við atliti at teimum evnisligu brotingunum verður sum tað fyrsta mælt til at strika sokallaðu entry-regluni í kapittul 1 b. Mett verður ikki, at tørvur er á hesi áseting, sum í ringasta fall kann hava við sær ein beinleiðis inntøkumiss fyri landskassan.

Tá persónur ella felag eftir føroyskum reglum skal rinda skatt av vinningi við sølu av partabrøvum, fær viðkomandi frádrátt fyri skatt, sum er goldin uttanlands. Hetta er bæði galdandi sambært teimum tvískattassáttmálum, Føroyar hava við onnur lond, og eftir § 19 í kapitalvinningsskattalógini. Við hesum er tryggjað, at, at inntøkan ikki verður dupultskattað.

Næsta broytingin snýr seg um sølu av partabrøvum til felagið, sum hevur givið út partabrøvini.

Tá partabrøv verða avhendað til felagið, sum hevur givið út partabrøvini, skal upphæddin roknast sum vinningsbýti. Skattaáløgan fevnir um alla avhendingarupphæddina uttan frádrátt fyri keypspphæddina, meðan ein vanlig partabrævasøla einans fevnir um uppgjørdan vinning ella tap.

Endamálið við verandi áseting er at forða partaeigarum í at krógva (maskera) eina útlutan av vinningsbýti sum eina partabrævasølu við at avhenda partabrøv til felagið, sum hevur givið virðisbrøvini út.

Tá eitt børsskrásett felag keypir egin partabrøv á einum skipaðum marknaði við tí endamáli antin at lækka partapeningin ella at nýta partabrøvini sum lið í lønargjaldi til starvsfólk, er talan um eitt gjøgnumskygt afturkeyp.

Keypið verður framt í samsvari við reglurnar um Safe Harbour. Endamálið við Safe Harbour reglurnum er av verja móti insidarahandli og marknaðarmanipulatión. Tískil verður stórur dentur lagdur á gjøgnumskygni í afturkeypsprogrammum.

Hetta inniber, at treytirnar fyri og endamálið við afturkeypsprogramminum skal almennakunngerast áðrenn programmið verður sett í verk, eins og marknaðurin skal fráboðast, tá programmið er at enda komið. Harumframt skulu framdir handlara regluliga almennakunngerast. Tað er ein treyt fyri at nýta Safe Harbour reglurnar, at endamálið við afturkeypsprogramminum er at minka um partapeningin (annullera partabrøvini) ella at partabrøvini verða nýtt sum liður í lønargjaldi til starvsfólk.

Triðja broytingin snýr seg um útlutan úr einum deyðsbúgvi, til arvingar ið ikki er heimahoyrandi í Føroyum.

Við uppskotinum verður tað framyvir bert møguligt at koma í støðuna hjá tí deyða (succedera) eftir § 12 í kapitalvinningsskattalógini, um hjúnafelagi, arvingur ella legatarur er fult skattskyldugur í Føroyum og ikki verður mettir heimahoyrandi í øðrum landi, sbrt. tvískattasáttmála.

Líknandi áseting er í § 13, stk. 7 í somu løgtingslóg sum viðvíkur successión í livandi lívi.

Endamálið við §§ 12 og 13 í kapitalvinningsskattalógini er at útseta skattleggingina. Endamálið er ikki at veita skattafrítøku, og er tað orsøkin til, at mælt verður mælt til at seta eitt nýtt stykki aftaná § 12, stk. 3 í kapitalvinningsskattalógini.

Við fjórðu broytingini verður § 18, stk. 1 orðað av nýggjum lutvíst fyri at nágreina ásetingina, lutvíst fyri at eggja borgarunum  til at nýta talgildu loysninar hjá TAKS.

Við fimtu broytingini verður staðfest, at skyldan sambært § 21, stk. 1 í kapitalvinningsskattalógini, sum áleggur øllum, ið eru fevnd av løgtingslógini, at leggja fyri TAKS allar tær upplýsingar, sum kunnu verða viðkomandi fyri TAKS í eftirlitshøpi. Ásetingin fevnir eisini  um triðjamann, sum hevur í hendi upplýsingar hjá einum, sum er fevndur av løgtingslógini.

Sætta broytingin er at síggja sum ein avleiðing av broyttu orðingini í § 18, stk. 1 í kapitalvinningsskattalógini.

Við sjeyndu broytingini verður eitt nýtt nummar sett inn í § 24, stk. 1 í kapitalvinningsskattalógini, sum víðkar greinina til eisini at fevna um brot á upplýsingarskylduna í § 21, stk. 1 og fyri at forða TAKS í at koma á staðið sambært § 21, stk. 2 í somu løgtingslóg.

Umframt evnisligu broytingarnar verða aðrar broytingar gjørdar. Stovnsheitir verða dagførd, revsireglur verða í ávísan mun herdar eins og málsligar nágreiningar verða gjørdar.

**1.2. Galdandi lóggáva**

§§ 1, stk. 1, 2 og 5, 2, 11, stk. 2, 12, stk. 3, 15, stk. 1, 18, stk. 5, 20, stk. 1, 21, stk. 2, 22, stk. 1, 26, stk. 1 og 2, 27 og 28, stk. 1, 4 og 5 nýta heitið “lóg” hóast rætta heitið, sbrt. løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, er “løgtingslóg”.

§§ 1, stk. 4, 5, stk. 2 og 14a, stk. 1 nýta heitið “Toll- og Skattaráð Føroya” hóast TAKS við løgtingslóg nr. 61 frá 2. mai 2022 um fyrisiting av skatti, tolli og avgjaldi hevur tikið yvir hesar heimildir.

Galdandi lóggáva hevur í kapittul 1 b reglur um skattliga viðgerð við tilflyting.

Í § 5, stk. 3 í galdandi løgtingslóg eru ongar  serligar reglur um keyp av egnum partabrøvum.

Í galdandi lóggávu er tað ikki eitt krav fyri at koma í støðuna hjá tí deyða (succedera) eftir § 12 í kapitalvinningsskattalógini, at hjúnafelagi, arvingur ella legatarur er fult skattskyldugur og skattliga heimahoyrandi, sbrt. tvískattasáttmála.

Í §§ 15, stk. 3, 16, stk. 2, 18, stk. 1 og 3, 20, stk. 1, 28, stk. 2 og 4 verður “Toll- og Skattstovu Føroya” nýtt, hóast rætta navnið á stovninum er “TAKS”.

Sbrt. § 18, stk. 1, 1-3 pkt. í galdandi løgtingslóg áliggur tað tí skattskylduga at geva upp skattskyldugu inntøkuna sambært § 14 á oyðublaði, sum Toll- og Skattstova Føroya letur

gera. Oyðublaðið skal latast Toll- og Skattstovu Føroya samstundis, sum sjálvuppgávan eigur at verða latin inn sambært reglunum í skattalógini. Persónar, feløg og grunnar o.o., sum hava fingið forprentað oyðublað, skulu tó ikki lata inn oyðublað, um so er, at forprentaðu upplýsingarnar eru rættar og fullfíggjaðar.

Við uppskotinum verða borgararnir eggjaðir til at lata inn uppgerð um borgaragluggan,hjá TAKS. Orðingin í galdandi løgtingslóg, forprentað oyðublað, kann tykjast ógreið, og orðingin verður tí broytt til, oyðublaði, sum TAKS letur gera, sum tykist greiðari.

Í §§ 18, stk. 1, 21, stk. 2, 22, stk. 2, 25, stk. 1, og 28, stk. 2 verður heitið "Toll- og Skattstova Føroya" nýtt, hóast heitið nú er "TAKS".

Sbrt. § 18, stk. 1, 5. pkt. verður Toll- og Skattaráð Føroya heimilað at fyriskriva neyvari reglur fyri metingum eftir § 18, stk. 1. Eftir at TAKS hevur yvirtikið heimildirnar hjá Toll- og Skattaráð Føroya er 5. pkt. óneyðugt og verður tí strikað.

Sbrt. § 21, stk. 1 í galdandi løgtingslóghava øll, sum eru fevnd av ásetingini, skyldu til at leggja fyri Toll- og Skattstovu Føroya øll skjøl, ið kunnu verða til sannan av álíkningini, tá hetta verður kravt.

Í nýggju ásetingini verður heitið á stovninum broytt til TAKS, eins og "skjøl" verður broytt til "upplýsingar, sum kunnu verða viðkomandi fyri TAKS í eftirlitshøpi".

Loksins er ásetingin víðkað til eisini at fevna um triðjamann, sum hevur í hendi upplýsingar hjá einum, sum er fevndur av ásetingini.

Sbrt. galdandi § 23, stk. 1 verður tann, sum við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda skatt av inntøku, ið er skattskyldug eftir hesi lóg, greiðir rangt frá, ella á annan hátt gevur villleiðandi upplýsingar ella letur vera við at lata inn oyðublað, sambært § 18, stk. 1, hóast forprentaðu upplýsingarnar ikki eru rættar og fullfíggjaðar, revsaður við sekt ella fongsli upp í 2 ár.

Sbrt. § 23, stk. 1 í uppskotinum verður "lóg" broytt til "løgtingslóg", eins "oyðublað" verður broytt til "upplýsingar".

Sbrt. § 24, stk. 1 í galdandi løgtingslóg verður við sekt tann persónur revsaður, sum við vilja ella av stórum gáloysni

1) letur vera við at halda aftur ella avrokna skatt av vinningsbýti eftir § 15
2) letur vera við at avrokna skatt av rentuinntøku eftir § 16.

Við uppskotinum verður revsiheimildin víðkað til eisini at fevna tann, sum brýtur upplýsingarskylduna í § 21, stk. 1 ella forðar TAKS í at nýta heimildina í § 21, stk. 2 at koma á staðið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at dagføra kapitalvinningsskattalógina við at áseta, broyta og nágreina reglur, sum antin hava víst seg at mangla, at vera óskynsamar ella at vera ov leysliga orðaðar.

Víst verður annars til kapittul 1.1.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við uppskotinum verða sonevndu entry-reglurnar, t.v.s. reglurnar um áseting av virðinum av partabrøvum við komu til Føroya, avtiknar, reglurnar um keyp av egnum partabrøvum verða fjølbroyttar eins og reglurnar um succession verða herdar.

Umframt áðurnevndu høvuðsbroytingar verður kapitalvinningsskattalógin sum heild dagførd.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá BankNordik, Bakkafrost, Atlantic Petroleum, TAKS Vinnuhúsinum og Felagnum Føroyskir Grannskoðarar.

Uppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri landið landið, men tað tørført er at seta tal á, og hetta hevur samband við tað, at tað illa ber til at spáa um, hvussu nógvir tilflytarir eiga partabrøv eins og tað er ógjørligt at meta um avleiðingarnar av, at verandi reglur um succesión hava verið ov óneyvar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, tí við uppskotinum verða heimildirnar hjá TAKS nútíðargjørdar, har hædd serliga verður tikin fyri, at talgild tøkni viðvirkar til eina meira skynsama umsiting.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

Við uppskotinum fáa serliga børsskrásettar fyritøkur eina skipan, sum er meira fjølbroytt. Verandi skipan viðger keyp av egnum partabrøvum uttan fyrilit sum útlutan av vinningsbýti, sum í roynd og veru er ein skattseting, har hædd ikki verður tikin fyri útveganarvirðinum. Við uppskotinum verður skipanin meira rúmlig, og hædd tikin fyri, hvørjar orsøkirnar eru til keypið. Verða grundgevingarnar mettar at vera haldgóðar, er tað ikki øll avhendingarupphæddin, men bert vinningurin/tapið, sum verður skattliga viðgjørt.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið er í samsvari við millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotinum sampakkar við hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) **Hoyvíkssáttmálan**

2) **Evropiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

**3) Sáttmálian um Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og tað verða heldur ikki gjørd onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Talan er um eitt skattauppskot.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
**Nr. 1**
Heitið "lóg" verður í greinunum, sum eru nevndar í nummarinum broytt til "løgtingslóg", sum er rætta heitið sbrt. løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

**Nr. 2**
Talan er um eina reint formliga broyting, sum hevur samband við, at TAKS hevur yvirtikið uppgávurnar, sum Toll- og Skattaráð Føroya hevði.

**Nr. 3**
Við ásetingini verður kapittul 1 b í kapitalvinningsskattalógini strikað, og er tað grundað á, at tað ikki er tørvur á sokallaðu entry-regluni í kapitalvinningsskattalógini, sum í roynd og veru kann hava við sær inntøkumiss fyri landskassan.

Tá persónur ella felag eftir føroyskum reglum skal rinda skatt av vinningi við sølu av partabrøvum, fær viðkomandi frádrátt fyri skatt, sum er goldin uttanlands. Hetta er bæði galdandi sambært teimum tvískattassáttmálum, Føroyar hava við onnur lond, og eftir § 19 í kapitalvinningsskattalógini. Við hesum er tryggjað, at inntøkan ikki verður tvískattað.

Dømir um møguligar avleiðingar eftir galdandi áseting, har virðið við tilflyting verður drigið frá søluupphæddini:

Dømi 1.

Virðið við tilflyting er 100 mió. kr., meðan veruliga útveganarvirðið er 10 mió. kr. Um partabrøvini seinni verða seld fyri minni enn 100 mió. kr., fær viðkomandi frádrátt í Føroyum, hóast viðkomandi í veruleikanum fær ein vinning, sum ongantíð er skattaður, hvørki her ella aðrastaðni, um exit-skattur ikki er goldin uttanlands við fráflyting.

Tað eru ikki øll lond, sum hava exit-reglur, og tað eru lond, sum bert exit-skatta persónar og feløg, sum hava verið skattskyldug í landinum í eitt longri áramál. Í Danmark t.d. skal eingin exit-skattur rindast við fráflyting, um viðkomandi ikki hevur verið skattskyldugur har í ávíst áramál.

Dømi 2.

Um virðið við tilflyting er 100 mió. kr., veruliga útveganarvirðið er 10 mió. kr., og partabrøvini verða seld fyri 90 mió. kr. eftir tilflyting til Føroya, so hevur viðkomandi reelt ein vinning uppá kr. 80 mió. kr. Viðkomandi fær tó við entry-reglunum eitt tap uppá 10 mió. kr., sum viðkomandi fær frádrátt fyri í uppgerðini eftir kapitalvinningsskattalógini.

**Nr. 4**
Talan er bert um sølu partabrøvum, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði, og har endamálið við afturkeypinum antin er at minka partapeningin ella at nýta partabrøvini sum lið í lønargjaldi til starvsfólk.

**Nr. 5**
Við verandi orðing hava Føroyar ikki heimild til at skatta ásannaðan vinning av virðisbrøvum, tá hesi verða útlutað úr einum deyðsbúgvi til arvingar, ið ikki eru heimahoyrandi í Føroyum.

Við uppskotinum verður skipanin tí broytt soleiðis, at arvafylgjan (successión) úr einum deyðsbúgvi, sbrt. § 12 í kapitalvinningsskattalógini, verður treytað av, at hjúnafelagi, arvingur ella legatarur er fult skattskyldugur í Føroyum og ikki verður mettir at vera heimahoyrandi í øðrum landi sbrt. tvískattasáttmála. Líknandi áseting er í § 13, stk. 7 í kapitalvinningsskattalógini, sum viðvíkur successión í livandi lívi.

Endamálið við ásetingunum í §§ 12 og 13 í kapitalvinningsskattalógini er, at skatturin verður útsettur. Endamálið er ikki, at veita skattafrítøku, og verður ásetingin tí umorðað. Við umorðingini verður successión úr einum deyðsbúgvi treytað av, at arvingurin er fult skattskyldugur í Føroyum og ikki er heimahoyrandi í øðrum landi.

**Nr. 6**
Talan er um eina reint formliga broyting, sum hevur samband við, at skattamyndugleikin í Føroyum hevur skift navn frá Toll- og Skattstova Føroya til TAKS.

**Nr. 7**
Við broyttu orðingini verða skattgjaldarar eggjaðir til at lata inn uppgerð um borgaragluggan,hjá TAKS.

Harnæst er orðingin í galdandi løgtingslóg, forprentað oyðublað, ógreið og ótíðarhóskandi, og orðingin verður tí broytt til, oyðublaði, sum TAKS letur gera, sum tykist greiðari.

**Nr. 8**
Talan er um eina formliga broyting, har heitið Toll- og Skattstova Føroya verður broytt til TAKS, sum er heitið á stovninum nú.

**Nr. 9** Eftir at TAKS hevur yvirtikið uppgávurnar hjá Toll- og Skattaráð Føroya er ásetingin óneyðug og verður tí strikað

**Nr. 10**
Við broytingini verður upplýsingarskyldan víðkað til eisini at fevna um triðjamann, um hesin hevur í hendi upplýsingar hjá einum, sum er fevndur av hesi løgtingslóg, samstundis verður ásetingin nágreinað.

**Nr. 11**
Við uppskotinum verður “lóg” broytt til “løgtingslóg”, eins og “oyðublað” verður broytt til “upplýsingar”.

**Nr. 12**
Við broytingini verður ásetingin víðkað til eisini at fevna um brot á upplýsingarskylduna í § 21, stk. 1 og fyri at forða TAKS at koma á staðið sambært § 21, stk. 2 í kapitalvinningsskattalógini.

**Til § 2**
Áseting um ígildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 17. oktober 2022

**Uni Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: